## Ike fór við vegnum

Leivdirnar av tropisku ódnini Ike gjørdu nógv um seg í Eysturgrønlandi og pørtum av Íslandi, tá tær fóru norður ígjøgnum Grønlandsfjørðin í gjáranáttina. Eitt var, at tað djúpa lágtrýstið hevði storm við sær, men tað óvanliga nógva regnið gjørdi størri skaða enn vindurin. Á Vestfirðum í Íslandi fóru fleiri vegir illa av áar- og skriðulopum. Eitt nú steðgaði ein stór skriða allari ferðslu til Patreksfjørðin, og vegurin á Arnarfirði fór illa, sum myndin vísir.



## Húsaprísurin fellur

Danskir húsaeigarar hava ikki tey bestu útlitini, tí sambært Tjóðbankanum fer húsaprísurin framvegis at fella tey næstu árini. Bankin sigur í einari nýggjari fráboðan, at húsaprísurin fer at fella fýra prosent í ár, 2,2 prosent næsta ár og 0,8 prosent í 2010. Samstundis fara íløgurnar í bústaðir at fella, eftir at tær hava verið støðugt hækkandi á hvørjum ári síðani í nítiárunum. Tjóðbankin uggar húsaeigararnar við, at reallønin fer at veksa, rentan verður á einum sømiligum støði, og at arbeiðsloysið verður verandi lítið.

# Skipasmiðjan skift samleika

**Á tíðindafundi í morgun boðaði leiðslan í Skipasmiðjuni frá, at fyritøkan hevði valt at skifta samleika. Nýggja heitið á fyritøkuni er MEST**

SAMLEIKI
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*




*Eyðfinn Egholm, stjóri, greiddi frá nýggja samleikanum hjáskipasmiðjusamtakinum, sum hereftir ber heitið MEST*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Maskin ella Mekanik, El ella Elektronik, Stál og Timbur.

Tað eru heitini handan styttingina MEST, sum er nýggja navnið hjá Tórshavnar Skipasmiðju og undirdeildunum.

Faroe Yard, Skipasmiðjan, FJM Runavík, Tórshavnar Skipasmiðja, Skála Skipasmiðja og Vestmanna Skipasmiðja eru sostatt heiti, ið eru farin í søguna. Heitini verða nú MEST og síðani navnið á staðnum. MEST Tórshavn, MEST Runavík og so framvegis.

- Tað eru tvær høvuðsorsøkir til, at vit hava valt at skifta navnið út. Eitt er, at tað skal verða lætt at kenna okkara fyritøku aftur, uttan mun til um talan er um Tórshavn, Skála, Vestmanna ella Runavík. Og hin stóra orsøkin er, at útlendingar fáa upp í fleiri knútar á tunguna, tá teir royna at siga eitt nú Tórshavnar Sipasmiðja, sigur Eyðfinn Egholm, stjóri í MEST.

Hann sigur, at nýggja navnið fer at geva øllum eina felags kenslu, samstundis sum tað er lætt at siga á øllum tungumálum. Hartil heldur hann, at signalvirðið er virðiligt.

### Navnakapping

Arbeitt hevur verið í eina tíð við hesari ætlanini, og einaferð í summar varð skrivað út ein innanhýsis navnakapping millum øll starvsfólkini.

- Áhugin fyri hesi kapping var sera stórur, og tað komu heili 80 uppskot inn. Treytirnar fyri navninum var, at heitið skuldi verða stutt, munnrætt og sigandi. Síðani varð ein navnanevnd sett, sum skuldi veja millum uppskotini. Henda slapp sjálvandi ikki sjálv at seta fram uppskot. Síðani gjøgnumgekk navnanevndin øll 80 uppskotini, og valdi síðani hetta út, sigur Eyðfinn Egholm.

Hetta fór alt fram anonymt, so eingin visti, hvat uppskot hvør hevði sett fram.

- Vit fara nú at prenta okkara nýggja samleika á hjálmar, klæðir, bilar, kranar, bygningar, stutt sagt á alt, sum hevur við okkara fyritøku at gera. Eingin skal nakrantíð verða í iva um, at tað er ein persónur frá MEST, sum kemur á vitjan, ella sum onkur hevur við at gera, sigur Eyðfinn Egholm.

Teir fara at halda seg til bláa litin í búmerkinum allastaðni, har tað yvirhøvur er møguligt.

- Har, sum bakgrundin er myrk, verður liturin á búmerkinum hvítur. Men annars verður búmerkið blátt alla staðni, har tað ber til, sigur Eyðfinn Egholm.



*Tá nýggjur sleipibátur er bygdur, verður Pressarin fluttur inn á Skála, har hann skal veita tænastur á Skálafjørðinum*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

### Nýggj virkisumráði

Annars upplýsti stjórin í MEST, at teir vóru í holt við at leggja síðstu hond á eina nýggja beding á Skála, sum kann taka skip upp til 1500 tons. Til sammetingar kann minna bedingin í Havn taka skip upp til 1000 tons, meðan tann størra kann taka skip heilt upp til 2500 tons. Vanliga taka teir tó ikki størri skip enn 2000 tons upp.

Hartil hevur MEST á Skála eina dokk, sum kann taka 120 metur long skip.

MEST hevur annars nóg mikið av arbeiði í langa tíð fram. Ein nýbygningur til Thor í Hósvík varð latin í juni, og teir standa á gáttuni at skriva undir sáttmála um enn ein nýbygning til Thor.

- Annars hava vit fingið góðar royndir at umbyggja skip frá vanligari olju til tungolju, og tað er jú nakað, sum er ógvuliga aktuelt í hesum tíðum við dýrum oljuprísum, sigur Eyðfinn Egholm.

Tendensurin er, at supplyskipini gerast størri og størri. Vanliga liggja hesi skip um 70-80 metrar, men alt fleiri velja at byggja skip um 100 til 120 metra longd.

- Og har kunnu vit als ikki vera við. Men vit hava lagt okkum eftir at fáa viðlíkahald á teimum 70-80 metra longu skipunum, tí tað vísir seg, at serliga norsku skipasmiðjurnar leggja seg eftir teimum størru skipunum, sigur Eyðfinn Egholm.

Eisini hevur MEST fingið nakrar fyrispurningar um fiskiskip, og tað er av júst somu orsøk, nevniliga tí at norsku skipasmiðjurnar heldur leggja seg eftir at byggja stór skip til oljuvinnuna.

### Arbeiði fimm ár fram

Eitt annað virkisøki, sum MEST ætlar sær at sleppa inn á, er at hjálpa stóru ferðamannaskipunum at kei. Hetta hava tey í stóran mun higartil gjørt uttan hjálp, men MEST ætlar í samstarvi við Tórshavnar Havn og tryggingarfyritøkurnar hjá skipunum at bjóða eina munandi tryggari atløgu av stóru skipunum fram.

Til hetta endamálið ætlar MEST at byggja ein nýggjan sleipibát, fyri síðani at lata Pressaran flyta inn á Skála, har hann kann veita tænastur á Skálafjørðinum.

Annars er MEST í holt við spennandi verkætlanina, saman við Fiskirannsóknarstovuni at menna eitt nýtt fiskirannsóknarskip. Og tað arbeiðið gongur væl.

- Vit vóru valdir út í kapping við aðrar at menna og byggja hetta skipið, og arbeiðið gongur sína gongd, sigur Eyðfinn Egholm.

Og sambært stjóranum á MEST sær framtíðin ljós út.

- Altjóða fíggjarkreppan rakar bert í lítlan mun okkum. Og megna vit at fremja tær ætlanir, sum vit hava fyri framtíðina, so er arbeiðið tryggjað í minst fimm ár fram í tíðina, sigur Eyðfinn Egholm, stjóri í MEST.